Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# Ársfrágreiðing

2020

# Innihaldsyvirlit

Vælkomin ... 2
Sáttmálasamráðingar og COVID-19 ... 3
Gongdin í sáttmálasamráðingunum 2020 – 2021 ... 6
Samráðingarheimildin sambært § 5 stk. 5 í KSL ... 7
Samráðingarheimildin ... 7
Semjan við Starvsfelagið ... 8
Rammuavtala millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið ... 8
Sáttmálasamráðingar 2021 – ... 9
Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna og við Havnar Arbeiðarafelag ... 9
Føroya Pedagogfelag ... 9
Heilsuhjálparafelag Føroya og Starvsfelagið ... 9
Átøk og verkætlanir ... 10
Hoyringar ... 12
Lógaruppskot um broytingar í ALS – lóggávuni ... 12
Lógaruppskot um at leggja uppgávurnar hjá Føroya vanlukkutryggingarráðið til Arbeiðs- og brunaeftirlitið at umsita ... 12
Lógaruppskot um stytta arbeiðsviku ... 12
Kommunulæknavitjanir á Ellis- og røktarheimum ... 13
Vælferðarlógin ... 13
Endi ... 14
Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ... 16

## Vælkomin

Góðu fundarfólk!

Fyrst av øllum vil eg bjóða tykkum øllum hjartaliga vælkomin á ársfund okkara í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Sum kunnugt er meira helvtin av nevndini í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum mannað av nýggjum í sambandi við nevndarvalið í heyst. Hóast stóra skiftið í nevndini, er nevndin mannað aftur við umboðum, sum hava nógvar royndir, eisini á politiska pallinum.

Í hesi fyrstu ársfrágreiðing míni fari eg at siga frá virksemi felagsins í 2020. Eg fari at greiða frá nøkrum av teimum mest týðandi málunum, sum arbeitt var við í farna ári, harundir gongdina samráðingunum í undanfarna ári. Tikið verður samanum tær semjur og avtalur, sum gjørdar vóru í 2020. Hugt verður eisini fram á leið og ikki minst at samráðingunum, sum liggja fyri framman.

Eitt nøktandi úrslit av komandi samráðingum hongur í stóran mun saman við, hvussu væl vit hava umhugsað teir spurningar, ið væntandi fara at taka seg upp partanna millum, eins og at vit hava sett okkum eina kós. Tí er so sera umráðandi, at kommunurnar og interkommunalu feløgini virkar sum ein felags grundvøllur, sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið byggir alt sítt virksemi á.



## Sáttmálasamráðingar og COVID-19

COVID-19 setti sín heilt serliga dám á sáttmálasamráðingarnar í 2020. Sáttmálasamráðingarnar, sum byrjaðu í oktobermánaði í 2019 koyrdu sína vanligu gongd heilt fram til marsmánað 2020. Tað var longu í seinnu helvt av februarmánaði í 2020, at COVID-19 byrjaði at skapa órógv í dagliga arbeiði okkara; nógv fólk vóru ørkymlaði og dámdu ikki væl at hittast til samráðingarfundir, har nógv fólk, ið vanliga ikki koma saman, hittast.

Um hettar mundið vóru vit í samráðingum við fleiri fakfeløg, serliga vóru vit komin væl ávegis í samráðingunum við Starvsmannafelagið, nú Starvsfelagið, sum frammanundan hevði gjørt semju við Fíggjarmálaráðið soleiðis, at karmarnir fyri sáttmálaskeiðið vóru lagdir. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið vóru samd um karmarnar fyri sáttmálaskeiðið og meira og minni eisini um innihaldið í eini semju fyri tíðarskeiðið, men semja varð ikki undirskrivað, tá allar samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum støðgaðu upp orsakað av COVID-19 støðuni.

Í hesum sama tíðarskeiði vóru sáttmálasamráðingarnar við Heilsuhjálparafelagið eisini komnar væl ávegis, men partarnir høvdu ikki funnið semju um karmarnar fyri sáttmálaskeiðið – eins og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið. Semingsstovnurin var komin uppí samráðingarnar, royndi semju millum partarnar júst, tá løgmaður heitti á allar føroyingar um at vísa varsemi, grundað á óvissu støðuna, sum COVID-19 hevði við sær. Heitt var tá eisini á øll alment sett starvsfólk um at arbeiða heiman ífrá, har tað bar til. Hóast serstøku støðuna náddu vit akkurát at gera eina semju við Heilsuhjálparafelagið, áðrenn alt samfelagið meira og minni støðgaði upp.

Samráðingarnar við handverkarafeløgini vóru eisini komnar væl ávegis, hóast partarnir ikki vóru heilt á einum máli um lønarkarmarnar, varð uppskot til semju handað handverkarunum. Handverkarafeløgini tóku ikki av uppskotinum – og komu tískil eisini, sum fleiri onnur fakfeløg at bíða við samráðingunum til tamarhald aftur var á støðuni viðv. COVID-19.

Hendan heilt serliga støðan við COVID-19 fekk stórar avleiðingar fyri samráðingarnar; fíggjarmálaráðharrin meldaði út, at tíðin áðrenn COVID-19 veruliga tók seg upp, og tíðin aftaná eru ymiskar tíðir, soleiðis gjørdi óvissa støðan við COVID-19 tað neyðugt at gera tillagingar í kørmunum fyri eftirfylgjandi samráðingarnar.

Karmarnir fyri eftirfylgjandi samráðingarnar vórðu broyttar samsvarandi lønarkørmunum á privata arbeiðsmarknaðinum fyri sama tíðarskeið.

**Lønarhækkanin fyri tíðarskeiðið áðrenn COVID-19 veruliga tók seg upp og aftaná:**
Áðrenn COVID 19: Tann 1. okt. 2019 varð lønarhækkan givin í krónum ávikavist 795 kr./ 595 kr. aftrat mánaðarlønini. Tann 1. okt. 2020 hækkaði lønin 2,25%.

Aftaná COVID-19: Tann 1. januar 2021 hækkaði lønin 2,05%, meðan lønin hækkar 1,25% tann 1. okt. 2021.

Broyttu karmarnir hava víst eg at hava stóra ávirkan á seinni samráðingar okkara, ilt hevur verið at fingið fakfeløgini at taka undir við broyttu kørmunum, trupult er í heila tikið at fáa semjur í hús. Serliga var støðan beint aftaná broyttu karmarnar ógvuliga fastløst. Nevndin í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum tók tá stig til at fara í eitt samskifti við øll fakfeløgini á kommunala sáttmálaøkinum um, at gera 1 ára sáttmálar soleiðis, at partarnir fingu betri fortreytir at meta um óvissu útlitini orsakað av COVID-19 – og møguligar seinni avleiðingar á samfelagsbúskapin.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdi 1 ára sáttmálar við Føroya Skipara- og Navigatørfelag og við Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna.



Virksemið hjá okkum í tíðini við COVID-19 broyttist nógv; starvsfólkini í kommunalu umsitingunum arbeiddu í stóran mun heimanífrá, dagstovnar vóru stongdir, á eldraøkinum arbeiddi mann av øllum alvi við at gera mannagongdir og vegleiðingar fyri at verja eldru borgararnar móti COVID-19 farsóttini. Arbeiðið hjá fyrisitingini í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fór í stóran mun frá at verða samráðingar til at gera mannagongdir – og vegleiðingar um rættindini hjá starvsfólkunum á kommunala arbeiðsmarknaðinum í samband við íkomnu støðuna við COVID-19. Heitt varð á allar kommunalar – og interkommunalar arbeiðsgevarar um at venda sær til felagið um tørvur var á ráðgeving – og um at fylgja við á heimasíðu felagsins, har vegleiðingar og annað kunnandi tilfar varð lagt út.

Eitt av høvuðsendamálunum við at steingja samfelagið í tann mun, sum vit sóu í koronatíðini, var at fyribyrgja útbreiðsluni av COVID-19 og serstakliga at verja okkara eldru borgarar, harímillum tey, sum búgva á ellis- og røktarheimum. Nógv fyribyrgjandi arbeiði varð gjørt fyri at verja eldru borgararnar – og fyri at fáa dagliga arbeiðið á stovnunum at virka so væl sum møguligt í mun til tilrættislegging av arbeiðinum. Neyðugt varð at gera tillagingar í skipanina av arbeiðinum, bæði í mun til starvsfólkatørv og í samband við skipanina av vaktum o.a.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdi um hettar mundi seravtalur við fakfeløgini á eldraøkinum soleiðis, at arbeiðið skuldi ganga so smidliga sum møguligt. Seravtalur vóru gjørdar við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Heilsuhjálparafelagið og Heilsurøktarafelagið, har serstøk heimild var givin til at arbeiða 12 tíma vaktir og at planleggja yvirtíð inn í arbeiðsætlanina hjá starvsfólkunum. Semja var um, at starvsfólk á økinum kundi arbeiða upp í 60 tímar um vikuna.

Seinni vóru avtalur gjørdar soleiðis, at tað skuldi gerast møguligt at flyta starvsfólk frá einum starvsøki til annað starvsøki at arbeiða t.d. frá dagstovnaøkinum til eldraøkið. Soleiðis fingu kommunurnar møguleika at brúka arbeiðsmegina hjá starvsfólkum á dagstovnaøkinum, sum orsakað av tiltøkunum, sum Landsstýrið setti í verk fyri at minka um útbreiðsluna av COIVID-19, vóru send heim. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdi avtalu við Føroya Pedagogfelag, Starvsfelagið og við Føroya Arbeiðarafelag um, at starvsfólk á nevndu sáttmálaøkjum kundu flytast á eldraøkið at arbeiða.

Arbeitt varð alla tíðina við at kunna arbeiðsgevarar um støðuna hjá starvsfólkum, ið vórðu send til hús, tí einki arbeiði var til teirra. Vegleiðingar og kunningarskriv vóru send kommununum o.ø. kommunalum arbeiðsgevarum, har upplýst varð um rættindi og skyldur hjá ávikavist starvsfólkum og arbeiðsgevarum í koronatíðini. Serliga vóru tað tímaløntu starvsfólkunum, sum vóru rakt av tiltøkunum hjá Landsstýrinum. Tímalønt starvsfólk, ið vórðu send heim, tí einki arbeiði var til teirra, høvdu í útgangsstøðinum ikki rætt til løn frá arbeiðsgevaranum, tí var neyðugt at finna eina skilagóða loysn, sum tók hond um øll starvsfólkini í tíðarskeiðinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdi vegleiðingar um "rættin til løn frá ávikavist arbeiðsgevaranum ella frá dagpeningaskipanini" í samband við niðanfyrinevndu støður. Vegleiðingarnar vóru sendar arbeiðsgevarunum og lagdar á heimasíðu felagsins.

- Starvsfólk gerast sjúk av COVID-19
- Starvsfólk verða send í sóttarhald grundað á COVID-19
- Starvsfólk verða send til hús, tí einki arbeiði er til teirra

Seinni vóru eisini vegleiðingar gjørdar um frítíð, sum skuldi brúkast, áðrenn 1 mai. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið minti arbeiðsgevarar á, at feria, sum ikki er hildin innan 1. mai, fellur burtur. Lagt varð upp til, at arbeiðsgevarar gjørdu serstakar avtalur við starvsfólk, sum virkaðu í korona tilbúgvingini um at flyta restferiu til frítíðarárið 1. mai 2020, og á hendan hátt at gera undantak frá ásetingunum í frítíðarlógini.

Landsstýrið ger áhaldandi tilmæli um ymisk viðurskifti fyri at minka um útbreiðsluna av COVID-19. Landsstýrið heitir á føroyingar um at vísa varsemi um ferðast verður til útheimin.

Summarfrítíðin nærkaðist – og kommunalir arbeiðsgevarar høvdu fyri neyðini gera serstakar avtalur við starvsfólk um feriu og privata ferðing til útlandið, alt í mun til almennu tilmælini – og avleiðingarnar, sum privat ferðing kundi/kann hava á starvsviðurskiftini hjá einstøku starvsfólkunum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur í hesum sambandi latið gera vegleiðing, har lagt verður upp til at leiðarar og starvsfólk gera serstakar avtalur um feriu, tá starvsfólk velja at ferðast til útheimin. Avtala má gerast soleiðis, at starvsfólk fáa møtt aftur til arbeiðis rættstundis, starvsfólk mugu hugsa um at fáa lagt inn møguligt sóttarhald og annað í frítíðarskeiðið. Er avtala um fráveru ikki gjørd við arbeiðsgevara frammanundan uttanlandsferð kann tað hava starvsrættarligar avleiðingar, um starvsfólk ikki fáa møtt aftur til arbeiðis rættstundis.

Tað eru ikki staðfestir nógvir tilburður av COVID-19 í føroyska samfelagnum seinastu vikurnar. Tey, sum hava fingið staðfest smittuna seinastu tíðina, hava fingið staðfest smittuna við ferðing til Føroyar, við landamarkið.

Føroyar hava gjørt koppsetingarætlan í 12 stigum, byrjað varð við at koppseta starvsfólk í fremstu røð, síðani búfólk á ellis- og røktarheimum o.l. Síðani er ætlanin at koppseta persónar í serligum vanda at gera álvarliga sjúk – og teirra avvarðandi o.s.fr.

Koppseting móti COVID-19 sjúkuni gongur sína gongd yvir 18% av fólkunum í landinum hava fingið fyrra prikið, meðan uml. 10% hava fingið seinna prikið. Eftir koppsetingarætlanini eru allir føroyingar koppsettir um seinnu helvt av juli mánaði 2021.

## Gongdin í sáttmálasamráðingunum 2020 – 2021

Soleiðis, sum greitt er frá omanfyri, so varð Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í samráðingum við m.a. Starvsfelagið, Heilsuhjálparafelag Føroya, Maskinmeistarafelagið, Handverkarafeløgini og seinni Heilsurøktarafelagið tá COVID-19 byrjaði at gera um seg um mánaðarskiftið februar/mars 2020.

Sáttmálasamráðingarnar við Starvsfelagið vóru so at siga endaðar, steðgur varð í samráðingunum, tí Starvsfelagið hevði aðalfund og formansval var um hettar mundið. Tað, at lítil steðgur var í samráðingunum við Starvsfelagið gjørdi at vit valdu at seta ferð á samráðingarnar við Heilsuhjálparafelag Føroya. Samráðingarnar við heilsuhjálparararnar endaðu við eini seming tann 14. mars 2020.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur gjørt hesar semjur og avtalur í 2020:

**Heilsuhjálparafelag Føroya** – Partarnir tóku av semingsuppskoti frá Semingsstovninum. Semja varð undirskrivað ***tann 14. mars 2020.*** Aftrat lønarhækkanini, sum seinni varð mett høg, tí fortreytirnar fyri samráðingunum broyttust orsakað av óvissu búskaparligu útlitini eftir COVID-19. Harumframt fingu heilsuhjálparar aðrar tillagingar í lønartalvuna, harímillum eitt nýtt endastig.
Sáttmálin er galdandi fyri tíðarskeiðið 1. okt. 2019 til 30. sept. 2021.
Lønarhækkan 1. okt. 2019 á kr. 750, umframt tillaging av lønarskalanum. Tann 1. okt. 2020 hækkar lønin 2,25% - og nýtt lønarstig 12 verður sett inn.

**Starvsfelagið** – sáttmálin varð endurnýggjaður ***tann 3. juni 2020*** galdandi frá 1. okt. 2019 til 30. sept. 2021. Kommunali sáttmálin byggir á støðið í sáttmálanum millum Starvsfelagið og Fíggjarmálaráðið. Hendan semjan gjørdist ein avbjóðing, tí fyrsta semjan hjá Starvsfelagnum verð gjørd áðrenn COVID-19 – og hendan seinna semjan aftaná. Fíggjarmálaráðið vrakaði semjuna millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið í fyrsta umfari, men góðkendi semjuna seinni. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið legði nógv fyri, fyri at fáa semjuna góðkenda, tí tað var og er framvegis avgerandi fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, at starvsfólk innan sama sáttmálaøki fáa somu løn fyri sama arbeiði. Greitt verður nærri frá hesum málið niðanfyri undir samráðingarheimildini sambært § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini.
Lønarhækkan 1. okt. 2019 á 795 kr./595 kr. um mánaðin - og 1. okt. 2020 á 2,25%.

**Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna –** grundað á óvissu útlitini vegna COVID-19 gjørdu partarnir ***tann 29. juni 2020*** ein 1 ára sáttmála, galdandi frá 1. okt. 2019 til 30. sept. 2020. Lønarhækkanin 1. okt. 2019 var ávikavist 595/795 kr. pr. mánað. Sáttmálin gekk út aftur 1. okt. 2020. Partarnir hava verið í samráðingum aftur um nýggjan sáttmála, men tað er enn ikki eydnast pørtunum at finna semju um at leingja sáttmálan.

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag –** grundað á óvissu útlitini vegna COVID-19 gjørdu partarnir ***tann 1. juli 2020*** ein 1 ára sáttmála, galdandi frá 1. okt. 2019 til 30. sept. 2020.
Lønarhækkan 1. okt. 2019 á 1,56% og eftirlønin hækkaði úr 12,5% upp í 13,75%.

Sáttmálin fór sostatt úr gildi aftur 1. okt. 2020. Partarnir hava verið í samráðingum aftur, og hava góðtikið eitt semingsuppskot ***tann 11. mars 2021*** fyri tíðarskeiðið fram til 1. okt. 2022. Felagið legði stóran dent á at fáa eftirlønina upp, og hevur felagið nú rokkið teimum 15%, sum arbeitt hevur verið fram móti seinastu árini.

**Maskinmeistarafelagið** – sáttmálin varð endurnýggjaður ***tann 8. juli 2020.*** Umframt lønarhækkanina verður latin viðbót d til allar 1. vaktmeistarar, sum verða løntir eftir 12. lønarflokki.
Sáttmálin er galdandi fyri tíðarskeiðið 1. okt. 2019 til 30. sept. 2022.
Lønarhækkan 1. okt. 2019 á 2,56%, 1. jan. 2021 á 2,05% og 1. okt. 2021 á 1,25%.

**Heilsurøktarafelagið** – sáttmálin varð endurnýggjaður ***tann 10. juli 2020***. Sáttmálapartarnir vóru samdir um í sáttmálaskeiðinum at javnstilla skalagongdina hjá sjúkrahjálparum og heilsurøktarum.
Sáttmálin er galdandi fyri tíðarskeiðið 1. okt. 2019 til 30. sept. 2022.
Lønarhækkan 1. okt. 2019 á 2,56%, 1. jan. 2021 á 2,05% og 1. okt. 2021 á 1,25%.

**Danska Tannlæknafelagið** – sáttmálin varð endurnýggjaður ***tann 27. oktober 2020*** og fataði einans um lønarhækkan.
Sáttmálin er galdandi fyri tíðarskeiðið 1. okt. 2019 til 1. okt. 2022.
Lønarhækkan 1. okt. 2019 á 2,56%, 1. jan. 2021 á 2,05% og 1. okt. 2021 á 1,25%.

**Føroya Arbeiðarafelag** vegna dagrøktarar – sáttmálin varð framlongdur ***tann 3. desember 2020*** – eins og fyri dagrøktarar eftir sáttmála okkara við Starvsfelagið.
Sáttmálin er galdandi fyri tíðarskeiðið 1. okt. 2019 til 1. okt. 2021.
Lønarhækkan 1. okt. 2019 á 795 kr. og 1. okt. 2020 á 2,25%.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur fleiri serstakar avtalur við fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum um, at kommunalt sett starvsfólk kunnu fylgja einum sáttmála, har fakfelagið og Fíggjarmálaráðið hava samráðingarrættin, og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið bert samráðist um viðurskifti, sum eru serstøk fyri kommunala sáttmálaøkið.

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur serstakar avtalur við:**

Føroya Arbeiðarafelag – ruskinnsavnarar o.l.
Havnar Arbeiðarafelag – starvsfólk á Kommunalu Brennistøðini í Tórshavn
Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar – eldraøkið
Fysio- og Ergoterapeutfeløgini – eldraøkið
Kost- og Føðslufelagið – eldraøkið
BLF og AKF – starvsfólk í fyrisiting

# Samráðingarheimildin sambært § 5 stk. 5 í KSL

## Samráðingarheimildin

Heimildin at samráðast hevur felagið frá eigarunum Kommunufelagnum, SEV og IRF. Hinvegin, so hevur Fíggjarmálaráðið við ásetingini í § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini eina góðkennandi heimild í mun til allar sáttmálar og lønir í Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ger/ásetur. Sambært eini bókstavligari fatan av lógini skulu allir sáttmálar, avtalur og lønir, ið kommunurnar gera góðkennast av landsstýrismanninum við fíggjarmálum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur ikki undir við hesi fatan av lógini; felagið meinar ikki, at tað í ásetingini um góðkenning liggur nakað krav um, at allar lønir og flokkingar skulu sendast landsstýrismanninum til góðkenningar, heldur verður, eisini vísandi til viðmerkingarnar til lógina, hugsað um hægri lønir – og aðrar lønir, sum fara út um tað vanliga.

Eitt av endamálunum við nýggju kommunustýrislógini var, at kommunurnar skulu stýra egnum viðurskiftum í so stóran mun sum til ber, soleiðis skal eisini ásetingin í § 5, stk. 5 skiljast. Grein 5, stk. 5 er ikki ætlað til og gevur heldur ikki Landsstýrismanninum heimild til at forða fyri, at kommunalar lønir kunnu verða hægri – ella lægri enn lønir hjá landinum. Ásetingin er ætlað til, at tað generelt skal ansast eftir, at tað er ein javnvág millum lønir hjá landi og kommunum, at vit halda eitt javnt lønarlag.

## Semjan við Starvsfelagið

Semjan millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið varð, sum kunnugt gjør í einum tíðarskeiði, tá óvissu búskaparligu útlitini orsakað av COVID-19 støðuni í landinum gjørdu um seg. Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevði boðað frá, at neyðugt varð at endurskoða lønarhækkanir o.a. grundað á óvissu útlitini.
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tók undir við fráboðanini hjá landsstýrismanninum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið bjóðaði fyrrapartin av junimánaði øllum fakfeløgunum á kommunala arbeiðsmarknaðinum til fundar at umrøða støðuna, og lagt varð upp til at gera eitt ára sáttmálar. Við at gera eitt ára sáttmálar góvu vit Fíggjarmálaráðnum møguleika og stundir til at arbeiða við nýggju kørmunum aftaná COVID-19. Á hendan hátt fingu vit eisini betur møguleika at meta um, hvørja ávirkan COVID-19 fór at fáa á samfelagsbúskapin, og vit vildu tá seinni um heystið gerast meira greið um ávirkanina av COVID-19 – og um framtíðar karmarnar.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdi, sum vera mann tveir eitt ára sáttmálar. Hinvegin, so valdi felagið at gera ein tvey ára sáttmála við Starvsfelagið. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdi sáttmála við Starvsfelagið á sama støði, sum sáttmálin við Fíggjarmálaráðið, altso við sama lønarkarmi, sum undan COVID-19.
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið metir tað hava sera stóran týdning, at starvsfólk innan sama sáttmálaøki, fáa somu løn fyri sama arbeiði. Starvsfólk í starvi hjá landinum svarandi til 2/3 av limunum í Starvsfelagnum høvdu fingið lønarhækkan samsvarandi kørmunum undan covid-19, tí var tað avgerandi neyðugt, at limirnir í Starvsfelagnum í starvi hjá kommununum, altso síðsti 1/3 fekk somu lønarhækkan. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið metti semjuna at liggja innanfyri samráðingarheimildina í § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini, innanfyri rásarúmið, sum kommunurnar hava at gera sáttmálar fyri kommunalt sett starvsfólk.
Sáttmálin varð sendur Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar tann 3. juni 2020. Fíggjarmálaráðið vrakaði sáttmálan longu 5. juni, við tí grundgeving, at karmarnir aftaná COVID-19 vóru broyttir, og at tað ikki skuldi gerast fleiri sáttmálar á tí støðinum. Sáttmálin varð ikki vrakaður við eini fyrisitingarligari grundgeving vísandi til §5, stk. 5 í kommunustýrislógini, men heldur í mun til eina politiska áskoðan hjá landsstýrismanninum. Broyttar fíggjarligar fortreytir hjá landskassanum kunnu ikki brúkast sum lógligt atlit at vraka ein kommunalan sáttmála vísandi til § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini; einasta lógliga atlitið er, at tað skal tryggjast eitt javnt lønarlag millum land og kommunur.

At landsstýrismaðurin grípur inn í sjálvsavgerðar- og samráðingarrættin hjá kommununum uppá hendan mátan, og velur at vraka eina semju, sum liggur innanfyri lógarinnar karmar, tað kann Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ikki góðtaka.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið heitti tann 9. juni á Fíggjarmálaráðið um at viðgera sáttmálan av nýggjum. Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum góðkendi sáttmálan millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið tann 1. juli 2020, aftur hesaferð at grundgeva ítøkiliga fyri nýggju støðutakanini.

Samanumtikið er tað umráðandi at stríðast og at standa saman um stóru málini og at verja sjálvsavgerðarrættin hjá kommununum; hetta sóu vit eisini í hesum málinum, har bæði Kommunufelagið og allir borgarstjórar í landinum góvu Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fullan stuðul.

## Rammuavtala millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið hava sum arbeiðsgevarafeløg í stóran mun felags áhugamál á almenna og kommunala sáttmálaøkinum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er

sett í verðina fyri at samráðast um sáttmálar og lønir á kommunala sáttmálaøkinum, og felagið skal ráðgeva kommununum og interkommunalu felagsskapunum á hesum økjum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið, lønardeildin hava tí í stóran mun tørv á at samstarva um m.a. lønarlag, sáttmálaviðurskifti og um onnur arbeiðsmarknaðarmál. Partarnir hava tí seinastu tíðina arbeitt við at gera eina rammuavtalu um, hvussu og í hvønn mun samstarvast skal á ymiskum økjum av felags áhuga. Rammuavtalan skal tryggja, at partarnir halda seg til gjørdar avtalur – og at samstarvið verður skipað eftir ávísum leisti, sum byggir á eitt yvirskipað samstarv m.a. við regluligum fundum millum nevndina í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum og Fíggjarmálaráðið, um sáttmálasamráðingar, arbeiðsmarknaðarviðurskifti og onnur mál av felags áhuga.

## Sáttmálasamráðingar 2021 –

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur framhaldandi samráðingar við handverkarafeløgini, Havnar Arbeiðarafelag og Føroya Pedagogfelag. Hesir sáttmálar gingu út 1. okt. 2020.

### Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna og við Havnar Arbeiðarafelag

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er í løtuni í samráðingum við Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna og við Havnar Arbeiðarafelag um starvsfólk á kommunalu brennistøðini í Tórshavnar kommunu. Talan er í báðum førum um truplar samráðingar, har partarnir eru rættiliga langt frá hvørjum øðrum. Í báðum førum umhugsa partarnir at fáa semingsstovnin uppí samráðingarnar.

### Føroya Pedagogfelag

Sáttmálin við Føroya Pedagogfelag fór úr gildi 1. okt. 2020. Sáttmálasamráðingarnar byrjaðu sum vanligt við at partarnir handaðu krøv o.a. Samráðingarnar støðgaðu upp í november mánaði í 2020, tá Pedagogfelagið ynskti at fáa nýggju nevndina í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum á tal, áðrenn samráðingarnar verða tiknar upp aftur. Pedagogfelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hava havt fund – og umrøtt fyrispurning frá felagnum um, hvussu kommunurnar, sum arbeiðsgevarar (KAF) ætlar, at bøta um trotið á starvsfólkum á dagstovnaøkinum.
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið hava avtalað at arbeiða víðari við hesum evninum; avtalaðir eru tveir evnisdagar, har partarnir saman við Kommunufelagnum og Fíggjarmálaráðnum fara at umrøða m.a. hvørjar avbjóðingar vit síggja á stovnsøkinum í dag m.a. tørvin og samansetingina av starvsfólkum á økinum – fyri síðani at umrøða møguleikar og møguligar loysnir.
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ynskir, at samráðingarnar verða tiknar upp aftur skjótast til ber.

### Heilsuhjálparafelag Føroya og Starvsfelagið

Sáttmálarnir hjá ávikavist Heilsuhjálparafelag Føroya og Starvsfelagnum fara úr gildi í heyst tann 30. sept. 2021. Skulu vit røkka teimum málum, sum felagið hevur fyri samráðingum og samstarvi í síni heild, so eiga vit at byrja fyrireikingarnar til hesar samráðingar skjótast til ber. Tað er, sum áður nevnt umráðandi at vit umhugsa støðuna og teir spurningar, ið væntandi fara at taka seg upp partanna millum, eins og at vit hava sett okkum eina kós.
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fer í næstum at venda sær til kommunalu arbeiðsgevararnar og til leiðslurnar á eldraøkinum um at útvega okkum neyðugar upplýsingar í samband við fyriliggjandi samráðingarnar. Somuleiðis hevur tað eisini týdning fyri gongdina í samráðingunum, at kommunalu arbeiðsgevararnir geva til kennar ynskir um

broytingar í sáttmálunum til gagns fyri arbeiðsplássið og sáttmálaøkið. Felagið fer at leggja dent á ein góðan dialog við okkara arbeiðsgevarar og baklandið í heila tikið.

# Átøk og verkætlanir

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið raðfestir hvørt ár at skipa fyri sáttmáladøgum fyri leiðarum, starvsfólkum o.ø. sum virka á kommunala sáttmálaøkinum. Haraftrat seta vit okkum hvørt ár fyri, at arbeiða við ávísum evnum og at seta á skrá átøk sambært sáttmála, verkætlanir o.a.

Átøk og verkætlanir ætlaðar í 2020 og sum orsakað av COVID-19 í stóran mun eru flutt til 2021. Niðanfyri er greitt nærri frá nøkrum av teimum átøkum og verkætlanum, sum eru raðfest í tíðarskeiðinum.

## Sáttmáladagar um sáttmálar á eldraøkinum

Á hvørjum ári verður skipað fyri sáttmáladøgum fyri leiðarum og starvsfólkum í kommununum. Sáttmáladagar verða hildnir fyri at kunna okkara starvsfólk um sáttmálar okkara – og fyri at geva starvsfólkunum góða fatan av, hvussu tey skulu arbeiða eftir og skilja sáttmálarnar. Sáttmáladagarnir eru ætlaðir sum, ein proaktiv fyribyrging, soleiðis at skilja, at vit heldur velja at kunna kommunalu arbeiðsgevararnar um sáttmálar okkara, heldur enn at hava eitt beinleiðis eftirlit við at arbeiðsgevarar á kommunala sáttmálaøkinum fylgja galdandi sáttmálum.

Í næstum skipa vit fyri sáttmáladøgum fyri starvsfólk, sum virka á eldraøkinum t.e. um sáttmálar okkara við Heilsuhjálparafelagið, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Heilsurøktarafelagið. Ætlanin er at skipa fyri tveimum sáttmáladøgum. Dagarnir eru settir at verða um mánaðarskiftið mai/juni. Seinni verður skipað fyri sáttmáladøgum viðv. sáttmálunum fyri maskinmeistarum, handverkarum og fyri sáttmálar okkara á dagstovnaøkinum, fyri námsfrøðingar og hjálparfólk.

## Rekruttering

### Pedagogfelagið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið hava saman skipað fyri felags evnissdøgum við tí endamáli, at umrøða ymisk viðurskifti á kommunalu dagstovnunum. Pedagogfelagið hevur m.a. víst á starvsfólktrot á teirra økið, bæði á kommunala og á landsins sáttmálaøki. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið veit um avbjóðingina við starvsfólkatroti á dagstovnaøkinum, men ásannar, at avbjóðingin er skiftandi og ymisk kring landið.

Avbjóðingin við starvsfólkatroti er samansett, talan er ikki bert um, at tað er trupult at fáa fólk at velja økið til, stóri trupulleikin á økinum er væntandi fakligheit; fleiri kommunur hava ilt við at draga til sín fakliga væl kvalifiseraða arbeiðsmegi, at draga til sín starvsfólk við námsfrøðiligari útbúgving, ella aðrari viðkomandi útbúgving.

Vit mugu ásanna, at partarnar hava ymisk sjónarmið, tá tað ræður um, hvussu rekrutterings-avbjóðingin skal loysast m.a. tá tað kemur til broytingar í sáttmálanum partanna millum o.a. Tó eru vit samd um, at nakað skal gerast. Hvør kann gera hvat, og nær; hvat kunnu kommunurnar, dagstovnaleiðarar, politiska skipanin, Mentamálaráðið, Setrið og aðrir viðkomandi partar gera? Partarnir arbeiða við at koma nærri nøkrum loysnum, hvussu vit saman og/ella saman við øðrum kunnu loysa starvsfólkatrotið ella rættari sagt manglandi fakligheitina á dagstovnaøkinum.

## Heilsuhjálparafelagið

Eldraøkið hevur eins og dagstovnaøkið eisini avbjóðingar við at rekruttera starvsfólk. Avbjóðingin her er eins og á dagstovnaøkinum ymisk kring landið. Haraftrat hava økini til felags, at tað arbeiða nógv starvsfólk á økjunum – og at starvsfólkini í stóran mun arbeiða niðursetta tíð. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið arbeiðir í løtuni við at savna inn upplýsingar, ið eru neyðugir fyri at gera batar á økinum – og sum kunnu brúkast í felags kanning av setanarviðurskiftunum hjá heilsuhjálparum.

Sáttmálapartarnir ásanna, at stórur tørvur er á fleiri starvsfólkum – og eisini fleiri faklærdum starvsfólkum á eldraøkinum, tí ynskja sáttmálapartarnir at gera ávís átøk, fyri at bøta um støðuna á eldraøkinum.

Sáttmálapartarnir eru samdir um í sáttmálaskeiðinum at gera eina kanning av setanarviðurksiftunum hjá heima- og/heilsuhjálparum, at kanna um grundarlag er fyri, at heima- og/ heilsuhjálparar kunnu verða settir í starv við hægri-, ella fullum setanarbrøki. Tá kanningin er gjørd skipa sáttmálapartarnir fyri felags evnisdegi, har ljós verður varpað á m.a. setanarviðurskiftini og fakligheitina hjá heima- og/ heilsuhjálparum, sum starvast á eldraøkinum.

## Dátuverndarlóg GDPR

Nýggja dátuverndarlógin setur krøv um m.a., hvussu kommunurnar skulu handfara persónsupplýsingar, sum hesar liggja inni við m.a. sum arbeiðsgevari og sum kommunalur myndugleiki. Endamálið við skeiðinum var at geva luttakarunum frálæru í teimum grundleggjandi hugtøkunum í dátuverndarlógini, umframt at geva luttakarunum vegleiðing og praktisk amboð til at fyrireika kommununa til nýggju lógarkrøvini. Farið var gjøgnum stigini, sum umfata ábyrgdarbýtið, viðgerðarreglur, politikkir og mannagongdir, kortlegging av dátum v.m. Alt við serligum atliti til kommunur og tær uppgávur og tænastur, sum kommunur hava og veita, harundir teimum lógarkrøvum, ið kommunur eru fevndar av.

## Evnisdagur í lógini um setanarprógv

Felagið skipar í næstum, fyrst í mai mánaði fyri evnisdegi um lógina um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakarunum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum, umframt onnur viðurskifti í samband við setanarprógv.

## Kommunal hagtøl

Nevnd felagsins hevur tikið avgerð um, at lyfta støðið í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum uppá á eitt hægri stig, ikki bara viðv. samskiftinum í og frá felagnum, men eisini viðv. hagtølum o.a.

Arbeiðast skal við at professionalisera innsavningina av hagtølum, sum vit hava tørv á í samband við samráðingar o.a. Okkara ynski fyri framtíðina er at hava støðug hagtøl, ikki bara hagtøl, sum vit savna inn í samband við samráðingar o.a. Við einum kommunalum hagtalsgrunni skal tað verða møguligt at samanbera og greina økir, gongdina í ymsu økjunum, og lesa viðkomandi uppgerðir út frá tølunum. Skipanin skal tryggja felagnum støðug og álítandi hagtøl til nýtslu í samráðingum og í samskifti við aðrar myndugleikar.

Fyrisitingin í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum arbeiðir saman við Kommunufelagnum um, hvussu arbeiðið við einum kommunalu hagtalsgrunni skal skipast, hvørju hagtøl skulu fáast til vega, um verkætlanarfólk skal setast í starv, at byrja uppgávuna – ella um vit skulu keypa tænastuna uttanífrá skal støða takast til.

# Hoyringar

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er ein sjálvsagdur hoyringspartur á arbeiðsmarknaðinum, tá framdar verða dagføringar í galdandi lóggávu, og tá nýggj arbeiðsmarknaðarlóggáva verður send pørtunum á arbeiðsmarknaðinum til hoyringar.

Tað eru einans gjørdar smærri dagføringar í galdandi arbeiðsmarknaðarlóggávu seinastu árini, hóast vit hava grundleggjandi arbeiðsmarknaðarlóggávu, ið ikki er dagførd í sama mun sum sambærlig lóggáva á danska arbeiðsmarknaðinum, harímillum kann vísast til m.a. starvsmannalógina og frítíðarlógina.

Millum uppskot, ið Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur havt til hoyringar í 2020, kann nevnast:

## Lógaruppskot um broytingar í ALS – lóggávuni

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tók undir við broytingunum í lógaruppskotinum. ALS-lóggávan skal samsvara við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd.
Lagt verður upp til at hækka arbeiðsloysisstuðulin úr 75% upp í 80% av lønini, tó við einum hægsta marki á 18.500 kr. um mánaðin, hettar merkir, at ein sum hevur eina inntøku á:

1: 40.000 kr. um mánaðin fær 18.500 kr. – eftir broytingina er upphæddin tann sama 18.500 kr.

2: 16.000. kr. um mánaðin fær 12.000 kr. um mánaðin – og aftaná broytingina 12.800 kr.

Tað skal loysa seg at arbeiða, og tí skal ALS-stuðulin ikki verða hægri enn ein arbeiðaraløn. Hinvegin, so kunnu vit seta okkum spurningin um ALS-skipanin er góð nokk, sum tryggingarskipan hjá einum almennum starvsfólki, sum gerst arbeiðsleyst í eitt ofta stutt tíðarskeið. Spurningurin er um tíðin er komin til at endurskoða skipanina í síni heild.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur eisini undir við, at broytingar verða gjørdar í ALS-lógini, sum eru í samsvar við eftirlønarlógina.

## Lógaruppskot um at leggja uppgávurnar hjá Føroya Vanlukkutryggingarráðið til Arbeiðs- og brunaeftirlitið at umsita

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið metir tað verða eitt frambrot fyri arbeiðsumhvørvið og trygdina hjá teimum, sum eru fyri arbeiðsskaða, at leggja uppgávurnar hjá stovnunum báðum saman.
At skula fráboða arbeiðsskaðar tvey støð, er at gera fráboðanina óneyðugt trupla. Tí verður tað mett lættari og tryggari fyri arbeiðsgevarar og starvsfólk, at fráboðast skal á einum stað. Harvið verður eisini sloppið undan óneyðugum dupultfunktiónum á økinum.

## Lógaruppskot um stytta arbeiðsviku

Arbeiðsvikan er so líðandi í seksti- og sjeytiárunum stytt úr 48 niður í 40 tímar. Seinastu 40 árini hevur lógarásetta arbeiðsvikan í Føroyum kortini verið óbroytt. Til samanberingar varð lógarásetta arbeiðsvikan Í Danmark stytt niður í 37 tímar longu í 1990. Nøkur fakfeløg hava kortini samrátt seg til eina styttri arbeiðsviku, harímillum Starvsmannafelagið, har arbeiðsvikan er 39 tímar.
Uppskotssetararnir halda, at tíðin er komin til at dagføra lógina, og stigvíst stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar komandi árini.
Uppskotssetararnir mæla til, at hetta átti at verið tikið upp til trípartasamráðingar.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur verið til hoyring í Vinnunevndini, har felagið vísi á, at skal arbeiðsvikan styttast, so skal hetta gerast í samráðingum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Hvør arbeiðstími hevur eitt virði, ið svarar til eina árliga lønarhækkan á 2,5%.

## Kommunulæknavitjanir á Ellis- og røktarheimum

Norðoyar- Bú og Heimatænasta hevur samtykt eina verkætlan, har kommunulæknarnir í Norðoyggjum koma fast á vitjan á búeindum í kommununi mótvegis løn frá Norðoyar- Bú og Heimatænastu.
Orsøkin er tann, at tað er sera trupult at fáa kommunulæknarnar at koma á vitjan.
Fyri at veita búfólkunum bestu tænastuna – og fyri alt lætta um arbeiðið hjá starvsfólkunum varð farið undir verkætlanina í 2020.
Seinni samskifti millum Norðoyar- Bú og Heimatænastu og Kommunala Arbeiðsgevarafelag um serstaka løn til kommunulæknarnar var treytað av góðkenning frá Fíggjarmálaráðnum, sum umsitur sáttmálaøkið.
Tað skuldi ikki verið neyðugt, at veitt kommunulæknunum eitt eyka gjald fyri vitjanir á búeindum í kommununum, tí búfólkini eru fevnd av Heilsutrygd. Men víst verður til, at tænastan í dag als ikki er nøktandi, hvørki fyri búfólkini ella deildarleiðararnar.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er seinni boðið til hoyringar í Løgtinginum um læknavitjanir á Ellis- og Røktarheimum. Felagið vísti á tørvin hjá eldrarøktini, at tørvurin á læknavitjanum á Ellis- og røktarheimum undir serligari skipan er ymiskur kring landið. Mælt var til at arbeiða víðari við at fáa verandi skipan at virka, sum hon er ætlað.

## Vælferðarlógin

Við vælferðarlógini verða gjørdar broytingar í lógargrundarlagnum undir vælferðartænastum hjá landi og kommunum til fyrimuns fyri rættartrygdina hjá borgarunum, ið fáa tænastur og starvsfólk, ið veita hesar tænastur.

Vælferðarlógin varð send pørtunum til hoyringar fyrru ferð í 2018 – og aftur í januar mánaði í 2020. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið stuðlaði sjónarmiðunum, sum Kommunufelagið førdi fram í mun til samlaða vælferðarpakkan, sum innihelt hesi uppskot:

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.

Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð

Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum

Í uppskotinum um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. var broytingin stórt sæð at broyta uppbýtið millum land og kommunur samanborið við avgerðina hjá markamótsnevndini í mun til búpláss og aðrar tænastur til fólk undir 67 ár. Eftir avgerð hjá markamótsnevndini, so skulu kommunurnar útvega búpláss til borgarar undir 67, sum eru røktarkrevjandi alt samdøgrið – og sum hava eina aldurstreytaða sjúku. Lógaruppskotið leggur upp til linari treytir enn tær, ið eru ásettar í § 14, stk. 2, tí nú er treytin ikki, at talan er um aldurstreytaða sjúku. Við fyriliggjandi lógaruppskoti

verður alt demensøkið lagt til kommunurnar. Kommunufelagið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið mælti til, at demensøkið var tikið úr vælferðarpakkanum – og at land og kommunur seta seg saman at loysa avbjóðingina.

Ein afturvendandi avbjóðing er, at lógaruppskot verða send til hoyringar við alt ov stuttari freist. Hetta er sera óheppið, tí tað hevur týdning, at øll uppskot verða send til hoyringar soleiðis, at borgarar, vinnulív, almennir myndugleikar, stovnar o.o. fáa høvi at gera viðmerkingar og siga sína hugsan um lógaruppskotini.

Viðv. § 39 í vælferðarlógini: Lógarásetingin er meinlík ásetingini í § 5 í dagstovnalógini, sum skilur millum børn við serligum tørvi, sum kunnu integrerast í kommunalu dagstovnaskipanini og børn við heilt serligum tørvi, sum Almannaverkið eigur at veita tilboð til.
Kommunurnar eru ónøgdar við, hvussu § 5 í dagstovnalógini verður umsitin av Almannaverkinum. Í veruleikanum fer eingin skilnaður fram millum serligan og heilt serligan tørv, kommunurnar fáa alt ov oftani álagt at veita tilboð í mun til børn við heilt serligum tørvi á dagstovnaøkinum.
Kommunufelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið arbeiða í einum yvirskipaðum netverki á dagstovanøkinum við at fáa broytt praksis hjá Almannaverkinum í mun til § 5 á dagstovnaøkinum – vit vóna ikki at sama praksis fer at gera seg galdandi í mun til § 39 í vælferðarlógini.

## Endi

Tað er neyðugt at hava eitt virkið kommunalt arbeiðsgevarafelag, tí nógvar avbjóðingar liggja fyri framman, serliga kann eg taka aftur í aftur, at fleiri av okkara stóru sáttmálum eru farnir úr gildi, her kann nevnast sáttmálin við Føroya Pedagogfelag.
Samráðingarnar við Føroya Pedagogfelag hava ligið stillar seinastu mánaðirnir m.a. orsakað av, at partarnir báðir hava havt munandi skifti í nevndunum. Partarnir hava, sum nevnt, sitið saman aftur til evnisdagar, har vit hava tosað um mál, sum partarnir eru upptiknir av. Partarnir eru samdir um at taka samráðingarnar upp aftur skjótast.
Í heyst fara sáttmálar okkara við m.a. Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið úr gildi. Hugsast kann, at talan verður um truplar samráðingar, tá júst hesi bæði feløgini fingu hægri lønarhækkan enn onnur feløg í 2020, tá hesi megnaðu at gera sáttmála við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið, áðrenn COVID-19 veruliga tók seg upp.
Lønarhækkanin á kommunala og almenna arbeiðsmarknaðinum vórðu broyttar samsvarandi lønarhækkanini á privata arbeiðsmarknaðinum 1. mai 2020.

Eg skal at enda takka nevndini og starvsfólkunum fyri góða arbeiðið og góða samstarvið í farna ári.

Takk fyri.

Pauli Trónd Petersen, formaður

## Nevnd og starvsfólk í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum

### Í nevndini í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sita:

Pauli Trónd Petersen, form. Vestmanna kommuna
Per Martin Gregersen, næst form. Eystur kommuna
Dávur Juul, nevndarlimur Fuglafjarðar kommuna
Jógvan Kruse, nevndarlimur Sunda kommuna
Bogi Bendtsen, nevndarlimur Elfelagið SEV
Jóhannus Danielsen, nevndarlimur IRF

### Starvsfólk:

Anita Fuglø, leiðari
Jónleyg J. Bech, fulltrúi
Bina Reginsdóttir, fulltrúi

### Sáttmálar og avtalur

- Føroya Pedagogfelag fyri námsfrøðingar og hjálparfólk
- Starvsmannafelagið, høvuðssáttmálin og sáttmálin fyri dagrøktarar
- Heilsuhjálparafelag
- Danska Tannlæknafelagið
- Føroya Skipara- og Navigatørfelag
- Maskinmeistarafelagið
- Heilsurøktarafelagið
- Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna
- Føroya Arbeiðarafelag fyri dagrøktarar

  Serstakar avtalur

  1. Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
  2. Akademikarafelag Føroya
  3. Føroya Arbeiðarafelag – renovatión
  4. Havnar Arbeiðarafelag – renovatión
  5. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
  6. Fysioterapeutfelag Føroya
  7. Ergoterapeutfelagið
  8. Kost- og Føðslufelag Føroya

# Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**§ 1. Navn og limaskapur**

Stk. 1. Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.

Stk. 2. KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF.

Stk. 3. Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF.

Stk. 4. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

**§ 2. Endamál felagsins**

Stk. 1. Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:

• samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt

• røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.

• virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir

• gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið

• virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst

•við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

**§ 3. Upptøka**

Stk. 1. KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.

Stk. 2, Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

**§ 4. Útmeldan**

Stk. 1. Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.

Stk. 2. Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.

Stk. 3. Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

**§ 5. Ársfundur**

Stk. 1. Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.

Stk. 2. Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.

Stk. 3. Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.

Stk. 4. Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.

Stk. 5. Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør. Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.

Stk. 6 Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.

Stk. 7. Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra

b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.

c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi

d) Innkomin mál.

e) Ymiskt

**§ 6. Nevndin**

Stk. 1. Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.

Stk. 2. Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.

Stk. 3. Nevndin ger sína egnu starvsskipan.

Stk. 4. Nevndin velur sjálv formann og næstformann.

Stk. 5. Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.

Stk. 6. Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.

Stk. 7. Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

Stk. 8. Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

## § 7 Skrivstovan

Stk. 1. Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.

Stk. 2. Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.

Stk. 3. Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.

Stk. 4. Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

## § 8 Limagjald

Stk. 1. Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.

Stk. 2. Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.

Stk. 3. KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.

Stk. 4. Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

## § 9 Tekning

Stk. 1. Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

## § 10 Samráðingarnevnd

Stk. 1. Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.

Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.

Stk. 2. Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.

Stk. 3. Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

## § 11 Roknskapur og grannskoðan

Stk. 1. Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.

Stk. 2. Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

**§ 12 Tagnar- og upplýsingarskylda**

Stk. 1. Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.

Stk. 2. Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

**§ 13 Trætumál**

Stk. 1. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.

Stk. 2. Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**

Stk. 1. Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.

Stk. 2. Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.

Stk. 3. Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**

Stk. 1. Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.

Stk. 2. Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**

Stk. 1. Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014